*Finnbogi Ísaksson hevði stóran stuðul í tingbólkinum hjá Tjóðveldisflokkinum, men hann fekk ongantíð formligu áheitanina um at gera landsstýrismaður, tí hann boðaði í seinastu løtu frá, at hann vildi ikki hava starvið*



**Fyrrverandi tingformaðurin, Finnbogi Ísaksson, varð í síðstu viku ofta nevndur sum besta boðið upp á ovasta sessin í Mentamálaráðnum. Tað segðist, at royndi politikarin hevði fingið størstu undirtøkuna í tingbólkinum, men í síðstu løtu bar Finnbogi seg undan óformliga tilboðnum**

# Finnbogi vendi á trappuni

HEITUR SESSUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Mikumorgunin kunngjørdi Tjóðveldisflokkurin, at Annita á Fríðriksmørk skuldi verða nýtt landsstýrisfólk í mentamálum. Útnevningin setti punktum fyri nógvu spekulatiónunum og drúgvu politisku telvingini um, hvør eftirmaðurin hjá Annlis Bjarkhamar skuldi vera.

Tað hevur verið sagt, at Tjóðveldisflokkurin bara hevði tríggjar fundir um málið. Men føroysku telefeløgini hava vunnið nógvar pengar av nýggja landsstýrismanninum seinastu vikurnar. Nógv hevur verið tosað millum tjóðveldisfólk, og hóast formaðurin í Tjóðveldisflokkinum hevur víst á, at flokkurin hevur eina fasta mannagongd, tá ið landsstýrisfólk skulu veljast, so var tað um reppið, at skuggaspæl hevði við sær, at Høgni Hoydal misti meirilutan millum tingfólkið fyri Annitu á Fríðriksmørk, sum formaðurin – soleiðis sum Sosialurin visti at siga í síðstu viku – á fundi týsdagin í síðstu viku hevði heitt á tingbólkin um at velja.

Í somu grein í Sosialinum varð nevnt, at sentralar røddir í Tjóðveldisflokkinum vildu hava Finnboga Ísakson at gera come back á politiska pallinum sum mentamálaráðharri. Tá ið Finnbogi varð spurdur um hetta í síðstu viku, svaraði hann, at hann hevði onga áheitan fingið, og at um hann fekk eina áheitan, so skyldaði hann flokkinum at umhugsa hana gjølla.

Fyrradagin vildi Finnbogi Ísaksson einki siga um skuggaspælið um landsstýrissessin seinastu dagarnar.

– Eg fór burtur úr politikki fyri einum ári síðani, og fleiri viðmerkingar havi eg ikki til hatta, segði hann.

### Finnbogi størri undirtøku

Væl vitandi keldur í Tjóðveldisflokkinum siga fyri Sosialinum, at tað undan maratonfundinum týsdagin, sum tíðliga mikumorgunin endaði við, at Annita á Fríðriksmørk fekk landsstýrissessin, tóktist alt meiri sannlíkt, at um tað hevði komið til avkvøðugreiðslu í tingbólkinum millum Annitu á Fríðriksmørk og Finnboga Ísakson, so hevði Finnbogi fingið størri undirtøku.

Men tað kom ikki til skarpskeringar. Finnbogi fekk ongantíð formliga áheitan frá tingbólkinum um at umhugsa comebackið, og undan týsdagsfundinum fingu tey, sum høvdu arbeitt við at fáa Finnboga aftur á pallin, at vita, at hann kortini ikki var sinnaður at vera í uppskoti.

Tað er eitt ár síðani, at Finnbogi fór frá sum løgtingsformaður. Hann hevur hildið sambandið við politiska arbeiðið við líka. Hann hevur ofta vitjað í tingsalinum, og hann hevur skrivað nógvar skarpar politiskar greinar í Fregnum, síðani hann fór burturúr politikki. Nú hevði hann møguleikan at koma aftur í landsstýrið, men formliga áheitanin kom ongantíð.

Finnbogi hevur givið til kennar, at hann ikki ætlaði sær upp í part aftur. Harvið bar ikki til at fáa staðfest, hvussu nógv var í tíðindunum frá keldunum innarliga í Tjóðveldisflokkinum, sum longu í síðstu viku vistu at siga, at uppskotið hjá Høgna Hoydal var Annita á Fríðriksmørk, og nú søgdu, at undirtøkan fyri Finnboga hevði verið størri, enn hon var fyri Annitu á Fríðriksmørk.

Tá ið Finnbogi Ísaksson var úti av myndini týsdagin, stóð valið serliga ímillum Hergeir Nielsen og Annitu á Fríðríksmørk.

Tað var serliga ein veruleiki sum gjørdi, at valið fall á Annitu. Hann var, at hon er konufólk, og hann ikki.

Eftir at fyrst Helena Dam á Neystabø og síðani Annlis Bjarkhamar noyddust úr landsstýrinum, verður tað av mongum í Tjóðveldisflokkinum hildið, at flokkurin ikki kann liva við, at einki konufólk er í landsstýrinum.

Tí vóru dygdirnar hjá Hergeiri ikki vigaðar, sum tær áttu at havt verið.

Hergeir Nielsen hevur verið tingmaður í mong ár, og hann hevur eisini verið landsstýrismaður. Eingin ivast í, at hann er ein stórur stuðul í tingbólkinum hjá Tjóðveldisflokkinum. Hann røkir tingmannastarvið til fulnar, og hann er góður í orðaskiftinum. Tað hevði verið ov nógv hjá Tjóðveldisflokkinum at mist hetta. Harafturat hevði verið neyðugt hjá Tjóðveldisflokkinum, um Hergeir gjørdist landsstýrismaður, at valt nýggjan formann í Uttanlandsnevndini og nýggjan fyrsta næstformann í løgtinginum. Tað hevði verið ov mikið av tí góða, siga keldur í Tjóðveldisflokkinum.

### Stór uppgáva

At óvanliga stórur áhugi hevur verið fyri setanini komst millum annað av, at prosessin var so long. Tað kemst eisini av, at tá ið tað gjørdist alment, at formaðurin í Tjóðveldisflokkinum vildi hava Annitu á Fríðriksmørk, og at tíðindini um Finnboga Ísakson sum møguligan kandidat samstundis bórust, reageraðu nógv í kjarnuni í Tjóðveldisflokkinum.

Sessurin sum mentamálaráðharri verður mettur at vera sera heitur. Eitt er at tað, síðani Signar á Brúnni fór úr Mentamálaráðnum, hava verið fleiri útskiftingar. Tað hevur verið mett neyðugt at finna tann persónin í Tjóðveldisflokkinum, sum best var førur fyri at standa seg innanhýsis í Mentamálaráðnum, og sum eisini best megnaði at standa seg í politisku telvingini við løgmann og Fólkaflokkin sum heild.

Eitt annað eru uppgávurnar, sum liggja fyri framman. Landsstýrismaðurin skal fyrihalda seg til misnøgdina í fólkaskúlanum við, soleiðis sum nýggja fólkaskúlalógin verður umsitin og til áhaldandi krøvini frá miðnámsskúlunum um nýggjar bygningar. So er tað ikki minst, hvussu niðurstøðan, sum Umboðsmaðurin fyrsta dagin fer at koma við av Stumann Hansen-málinum. Tað hevur verið nevnt, at høvd kanska fara at rulla. Høgni Hoydal tók undir við avgerðini hjá Annlis Bjarkhamar, og tað kann gerast rættuliga áhugavert, hvat Umboðsmaðurin fer at siga um hetta.

Okkara góðu keldur siga seg vita, at nógv tjóðveldisfólk – eisini stórur partur av tingmanningini – heldur hevði viljað havt Finnboga Ísakson at tikið sær av hesum, enn tey vildu hava Annitu á Fríðriksmørk, sum ikki hevur somu politisku royndir, sum Finnbogi Ísakson hevur. Longu 1975–1978 umsat hann skúlamál í landsstýrinum. Seinni hevur hann verið landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Søgan um comebackið hjá Finnboga gjørdist ongantíð til politiskan veruleika. Finnbogi fekk ongantíð formligu áheitanina, sum hann segði seg vilja umhugsa, og so gjørdist Annita á Fríðriksmørk landsstýrismaður.

Í oddagreinini í Fregnum, sum av mongum verður mett sum talurør fyri ein part av Tjóðveldisflokkinum, verður hesa vikuna sagt, at Annita á Fríðriksmørk er ein neyðloysn hjá flokkinum.

Nú fær hon møguleikan at vísa, at tað er politiskur dugur í henni, og at hon megnar at handfara eitt nú stóru málini, sum liggja og bíða eftir henni.



# Lekur ímillum teori og praksis hjá Kristinu Háfoss

**Tað er ikki rætt at lata fólk ferðast ókeypis við skipunum hjá Strandferðsluni fyri tað um tey, sum koyra eftir vegunum, yvirum brýr og ígjøgnum tunlar, onki gjalda, sigur landsstýrismaðurin í samferðslumálum**

FERÐASEÐLAPRÍSIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Nú er farið at leka ímillum teori og praksis hjá Kristinu Háfoss.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum, er ikki samdur við Kristinu Háfoss um, hvussu prísurin fyri at ferðast ímillum oyggjar í Føroyum skal ásetast.

Í Sosialinum í gjár vísti løgtingskvinnan fyri tjóðveldisflokkin á, at tað liggur í kortinum, at tá ið undirsjóvartunnilin er goldin skal tað verða ókeypis at koyra ígjøgnum hann.

– Hvussu kunnu vit so forsvara, at tað framvegis skal kosta at ferðast við nýggja suðuroyarskipinum, tá ið tað er goldið, spurdi hon.



*– Hugsunarhátturin hjá Kristinu Háfoss hongur ikki saman. Skulu tey, sum sigla við skipunum hjá Strandferðsluni, ferðast ókeypis, hevði tað verið at givið teimum stórar sersømdir framum tey, sum noyðast at koyra, sigur Bjarni Djurholm*

### Samanber súrepli og appilsin

Bjarni Djurholm heldur, at hesi bæði kunnu als ikki samanberast.

– Hetta er sum at samanbera eitt surepli og eina appilsin, tí hugsunarhátturin hjá Kristinu Háfoss hongur ikki saman.

Hann sigur, at skal hugskotið hjá Kristinu Háfoss setast í verk, hevði tað í veruleikanum ført við sær, at tey, sum ferðast við skipi, høvdu fingið stórar sersømdir framum tey, sum ferðast við bili.

– Og tað kann ikki verða rætt at gera mun á fólki, heldur landsstýrismaðurin í vinnumálum.

Hann sigur, at tey, sum koyra ímillum bygdir og oyggjar í Føroyum í bili, ferðast ikki ókeypis í dag og tey koma ongantíð at ferðast ókeypis. Heldur ikki tey, sum koyra, og fara at koyra, um firðir og sund ígjøgnum undirsjóvartunlar, ferðast óeypis, og so langt ífrá tí.

– Tey, sum ferðast í bili, hava stórar útreiðslur av bilinum. Fyrst er hann dýrur at keypa. Og hvørja ferð, tey koyra ein kilometur, hava tey útreiðslur til brennievni, umframt tað, at dekk og bilur slítast.

Og Bjarni Djurholm leggur afturat, at tað er ikki so lítið av hesum útreiðslum ið enda í landskassanum í mvg og øðrum avgjøldum av ymsum slagi. Sostatt kostar tað ikki so lítið at koyra í bili ímillum bygdir í Føroyum og tey, sum koyra ígjøgnum undirsjóvartunnilin, skulu so gjalda ferðaseðilin afturat.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað, sum liggur í kortunum, er, at tá ið undirsjóvartunnilin er goldin, skulu tey, sum koyra ígjøgnum hann, framvegis betala fyri raksturin.

– Tað merkir, at tey skulu framvegis keypa ferðaseðil fyri at koyra ígjøgnum tunnilin, hóast gjaldið fer at verða munandi lægri enn tað er nú.

### Sleppa nógv bíligari

Bjarni Djurholm sigur, at skuldu so tey, sum sigla við skipunum hjá Strandferðsluni, ferðast ókeypis, hevði tað verið ein stórur fyrimur fyri tey.

– So høvdu tey ferðast heilt ókeypis, tí umborð á skipunum stendur bilurin stillur og sostatt hava tey heldur ongar útreiðslur av koyringini. Men skuldu tey hinvegin koyrt til Havnar, hevði tað kostað eina ávísa upphædd í brennievni, umframt at bilurin slítist og tað kostar eisini.

– Skuldu tey ferðast ókeypis til Havnar við Smyrli, hevði tað sostatt verið at givið teimum sersømdir afturímóti teimum sum noyðast at koyra ímillum bygdir ella oyggjar og tískil mugu betala fyri brennievni og slit á bilin.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at tosa vit um sigling, betalir tað almenna fyri at byggja skipini hjá Strandferðsluna.

– Tað almenna betalir eisini ein munandi part av rakstrinum fyri at ferðafólkini skulu sleppa bíligri. Tosa vit um Smyril, gevur hann stórt undirskot og tað, sum ferðafólk betala, er bara ein partur av tí, sum raksturin kostar.

– Men skulu tey ferðast ókeypis, sleppa tey enntá undan at betala tað, sum tað hevði kostað at koyrt ímillum í bili og tað kann ikki vera rætt, sigur landsstýrismaðurin í samferðslu.

– Øll vita, at tað er sanniliga ikki ókeypis at koyra í bili. Men skulu summi so sigla ókeypis, er tað at geva teimum sersømdir og tað er ikki rætt.

Bjarni Djurholm er greiður yvir, at tað kann tykjast tungt fyri tey, sum sigla, at betala fyri ferðaseðil. Men hann sigur, at veruleikin er, at tað almenna betalir eina munandi upphædd til Strandferðsluna, fyri at ferðaseðlaprísirnir kunnu verða munandi nógv lægri enn teir annars høvdu verið.

# Sleppa nú at sigla nógv bíligari við Strandferðsluni

**Prísurin á ferðaseðlum til útoyggjarnar við skipunum hjá Strandferðsluni, skal nú niður í helvt**

FERÐASEÐLAPRÍSIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal tað verða nógv bíligari at sigla ímillum útoyggjarnar í Føroyum og meginlandið.

Tað ætlar Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Hann arbeiðir nú við eini skipan, sum fer at gera tað so bíligt sum gjørligt at sigla ímillum útoyggjarnar og inn á meginlandið.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann fer at skjóta upp fyri løgtinginum at seta 700.000-800.000 krónur av til endamálið næsta ár.

– Hesin peningur skal brúkast til at lækka prísin á ferðaseðlum til og úr teimum smáu oyggjunum, sigur hann.

### Niður í helvt

Hann sigur, at siglingin til og úr útoyggj, kostar ikki tað stóra og tí røkkir ein upphædd upp uppá trífjórðings millión rættiliga langt.

– Metingar vísa, at við hesi upphæddini, kann prísurin á ferðaseðlum til og úr útoyggj, lækkast umleið niður í helvt, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur, at saman við Útoyggjafelagnum skal Strandferðslan nú gera eina skipan fyri, hvussu peningurin sum best skal býtast ímillum tær ymsu útoyggjarnar.

Landsstýrismaðurin sigur, at hendan skipanin kemur at umfata Svínoy, Fugloy, Kalsoy, Mykines, Skúvoy, Hest og Nólsoy.

Landsstýrismaðurin sigur, at hetta er eitt lið í royndunum hjá Vinnumálaráðnum at liva upp til ásetingarnar í útoyggjaálitinum.



*Fyri at gera tað léttari at búgva á útoyggj, skal prísurin á ferðaseðlum við skipunum hjá Strandferðsluni lækkast munandi næsta ár. Tað fer eisini at koma teimum, sum sigla til Fugloyar og Svínoyar við Másanum til góðar*

Hinvegin vísir hann á, at sandoyarsiglingin og suðuroyarsiglingin er tær báðar dýrastu ruturnar hjá Strandferðsluni. Har er myndin eitt heilt onnur og at tær verða ikki uppi í hesum.

– Landið hevur brúkt stórar upphæddirnar uppá siglingina um Skopunarfjørð og Suðuroyarfjørð og harafturat betalir landið eitt stórt ískoyti til hesar báðar rutuna hvørt ár í rakstrarhalli.